J.NR.

# Fráboðan um feriu

## í sambandi við lønarískoyti (korona)

### Vegleiðing

Arbeiðsgevari hevur skyldu til alt fyri eitt at boða ALS frá, um starvsfólkið fer í feriu, ella um broytingar eru í arbeiðslutfallinum hjá starvsfólkinum í mun til tað, sum upplýst var í umsóknini um lønarískoyti (korona). Starvsfólk kunnu ikki verða heimsend og samstundis vera í feriu, og hava tí ikki rætt til lønarískoyti, meðan tey halda frí.

Lønarískoytið verður goldið 14. hvønn dag, og arbeiðsgevari eigur alt fyri eitt at boða ALS frá, tá starvsfólk fer í feriu, og nær frítíðin endar.

Verður ikki boðað frá rættstundis, koma broytingarnar ikki við í komandi útgjaldinum og verða tí tiknar við í næsta útgjaldinum, sum verður tvær vikur seinni. Verður ov nógv goldið út í lønarískoyti av órøttum, kann tað verða kravt inn aftur frá arbeiðsgevaranum.

Aðrar upplýsingar um broytingar í setanarviðurskiftunum, sum ávirka útgjaldið av lønarískoyti, skulu eisini fráboðast beinanvegin. ALS hevur heimild til at útvega allar neyðugar upplýsingar um viðurskifti hjá arbeiðsgevara og starvsfólki - eisini upplýsingar frá TAKS.

Um tú sum arbeiðsgevari letur ALS skeivar upplýsingar ella tegir um umstøður av týdningi fyri rættindi hjá starvsfólki tínum til lønarískoyti, kunnu upphæddir, sum av órøttum eru goldnar, verða kravdar afturgoldnar frá tær sum arbeiðsgevara. Somuleiðis kanst tú sum arbeiðsgevari verða revsað/-ur við sekt ella hefti.

**Send við telduposti til als@als.fo**

**GG! Minnist til at goyma pdf-skjalið, áðrenn sent verður til Arbeiðsloysisskipanina.**

### 1 Arbeiðsgevari

| | |
|---|---|
| Navn | Tel |
| Gøtunavn og húsanummar | |
| Postsmoga / Postnr. / Býur/bygd | |
| Kontaktpersónur | Fartel |
| Teldupostur | |
| V-tal | |

Arbeiðsloysisskipanin
Tinghúsvegur 14 · Postsmoga 3022 · 110 Tórshavn
Tel 349550 · als@als.fo · www.als.fo

ALS

## 2 Upplýsingar um starvsfólkið

| |
|---|
| Føðingardagur og p-tal |
| Navn |

## 3 Feriu-tíðarskeið

| | | |
|---|---|---|
| Dagfesting: | Frá: / | Til: |
| Dagfesting: | Frá: / | Til: |
| Dagfesting: | Frá: / | Til: |

## 4 Viðmerkingar

## 5 Váttan

Undirritaði privati arbeiðsgevari bindi meg við hesum at geva ALS boð um allar broytingar í viðurskiftum hjá starvsfólki í starvi hjá mær viðvíkjandi omanfyri nevndu spurningum og annars um viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri útgjaldið av lønarískoyti frá ALS til míni starvsfólk.

Upplýsingarnar, latnar í umsóknarblaðnum, kunnu kannast av eftirlitinum hjá ALS við heimild í § 27 í Ll nr. 113 frá 13. juni 1997 við seinni broytingum.

☐ Eg vátti við trúnaðartreytum at hava lisið vegleiðingina á síðu 1, og at allar upplýsingar, sum eru latnar ALS í hesum umsóknarblaði, eru sannar.

Dagfesting

**Send við telduposti til als@als.fo**

**GG! Minnist til at goyma pdf-skjalið, áðrenn sent verður til Arbeiðsloysisskipanina.**